# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Veljarin eigur at fáa greið beskeð

Orðaskiftið um løgmansrøðuna gav onga ábending um, at sitandi samgonga ætlar at leggja frá sær. Gamaní var tað ikki full semja um øll mál. Men yvirhøvur var samgonguáaralagið gott, og tað kendist, at samgongufólk einki hava ímóti at halda fram í samgongu.

Kemiin millum tey, sum samstarva, verður ofta sagd at hava eins stóran og viðhvørt størri týdning fyri, at tað skal eydnast at samstarva, enn tað, sum tað verður samstarvað um. Valúrslitið, og harvið parlamentariska støðan eftir valið fara sjálvndi at vera avgerandi.

Men um tað er so, at kemiin hevur so stóran týdning, so tykist lítil ivi at vera um, at samgongan millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin fer at halda fram eftir løgtingsvalið.

Nú áttu flokkarnir at gjørt upp við seg sjálvar og hvønn annan, so veljarin verður kunnaður, áðrenn valstríðið av álvara fer at gera um seg. Flokkarnir hava hvør sína stevnuskrá, og flokkarnir eiga at fáa ávirkan út frá valúrslitinum. Samgonguskjal eigur ikki at verða undirskrivað undan valinum, men tað hevði sømt seg, um flokkarnir spældu meiri ítøkiliga út, enn tað higartil hevur verið vanligt at gjørt, um hvørji mál teir ætla at fremja, og flokkarnir áttu at spælt út við, hvussu ætlanin er at fíggja eitt nú menningar ætlanir á vælferðarøkjunum. Samgongan átti eisini at spælt út við, um hon framvegis ætlar, at sitandi løgmaður skal halda fram sum samgonguleiðari.

Sambandsflokkurin hevur skift formann, síðani løgtingsvalið fyri fýra árum síðani, og í vikuni, sum fór, valdi Fólkaflokkurin nýggjan formann. Á valinum í 2004 vóru formenninir í Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum løgmansevni. Veljarin hevur krav upp á at vita, um nýggju formenninir síggja seg sum møgulig løgmansevni eftir valið, ella um teir fara til val upp á at stuðla sitandi løgmanni.

Sjálvandi eru andstøðuflokkarnir áhugaðir í at sleppa upp í part. Einki er so óhugaligt sum at sita í andstøðu. Hetta góvu andstøðu politikkarar eisini til kennar undir orðaskiftinum um løgmansrøðuna, og nú fara teir at leggja sínar ætlanir fyri veljararnar.

Um veljararnir undan valinum fingu at vita samgonguætlanir, og hvør skal vera samgonguleiðari, so hevði tað verið lættari at tikið støðu til, um atkvøðan skal fara til ein av samgonguflokkunum, ella um hon skal gevast einum av andstøðuflokkunum, sum harvið kanska fer at fáa so mikið dygga undirtøku, at tað hjá samgonguflokkunum verður torført at halda hann uttanfyri.

Innlit og opinleiki eru vorðin lyklaorð í vinnulívi og umsiting. Tað er upplagt, at veljarin eisini í politikkinum fær so góð beskeð, sum tað ber til aðra staðni í heiminum at geva undan valum, og sum tað eigur at bera til hjá okkum eisini. Harvið verður lættari at taka støðu.

**Sosialurin**

## Almenn og privat heilsutænasta

**HANS PAULI STRØM**
Landsstýrismaður



Jógvan við Keldu, løgtingsmaður biðjur í opnum brævi í bløðunum beint undan ólavsøku um eina viðmerking til skriving í Dimmalætting, har læknastjórin á Landssjúkrahúsinum er endurgivin fyri at hava sagt, at Landssjúkrahúsið hvørki hevur heimild ella skyldu at senda sjúklingar til Klaksvíkar at fáa viðgerð.

Greinin í Dimmalætting tann 20. juli, har læknastjórin er endurgivin er ógreið og kann misskiljast. Tí er tað týdningarmikið, at nøkur viðurskifti verða fingin upp á pláss.

Í sjúkrahúslógini er ásett, at tey 3 sjúkrahúsini í Føroyum skulu samstarva - og tað gera tey eisini. Hetta framgongur týðuliga av álitinum um framtíðar sjúkrahúsverk, sum var til viðgerðar í Løgtinginum í apríl. Um so er, at tað var møguligt at senda ein sjúkling til viðgerðar á Klaksvíkar sjúkrahúsi, sum ikki kann viðgerðast á Landssjúkrahúsinum, so átti hetta at verið gjørt.

Hinvegin hevur Landssjúkrahúsið og serlæknar har - sum nú er - ikki heimild til at senda ein sjúkling til viðgerð á privatu klinikkini Artharmonia, sum hevur leigað seg inn á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

Tað eru fleiri serlæknar á føroysku sjúkrahúsunum, sum hava privat virksemi, við síðunar av sínum almanna starvi á sjúkrahúsunum. Hetta verður fíggjað av viðskiftafólki sjálvum ella gjøgnum sjúkrakassaskipanina, sum serlæknarnir hava avtalu við. Tað eru ikki sjúkrahúsini, sum rinda fyri hetta og tey kunnu tískil heldur ikki ávísa sjúklingar til hesa viðgerð.

Viðgerð, sum ikki kann fremjast á føroysku sjúkrahúsunum, verður fíggjað av kontuni fyri serviðgerð uttanlands. Henda viðgerð verður sum meginregla framd uttanlands. Tó kunnu tey føroysku sjúkrahúsini søkja Almanna- og heilsumálaráðið um fígging til, at viðgerðin verður framd í Føroyum, við at serfrøðingar koma higar í staðin fyri, at sjúklingurin verður sendur uttanlands. Tá verður millum annað hugt at, hvar viðgerðin er bíligari. Júst Klaksvíkar sjúkrahús hevur verið sera virki, tá tað kemur til, at gera avtalur um at fáa serfrøðingar henda vegin, soleiðis at færri sjúklingar er farnir av landinum, samstundis sum meiri virksemi hevur verið á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

Í okkara grannalondum verður nógv tosað um, hvussu greiður skilnaður kann verða tryggjaður millum almanna og privata virksemi innan heilsuøki. Hesin spurningur er eisini viðkomandi hjá okkum. Um so er, at alment settir serlæknar á sjúkrahúsunum kunnu senda sjúklingar, sum hava fingið ávísing til sjúkrahúsið, at verða viðgjørdir á síni privatu klinikk, so kann hetta føra til eina ógvuliga óhepna atferð.

## Væleydnað listaframsýning hjá Lions Club

**Listaframsýningini hjá Lions Club Tórshavn, sum var í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku, eydnaðist sera væl. Nógv fólk vitjaðu og nógvir málningar blivu seldur, so heilt fitt av peningi er komin inn til vælgerandi endamál**

**LIONS CLUB TÓRSHAVN**
Tíðindaskriv

Framsýningin í Müllers Pakkhúsið læt upp ólavsøkuaftan klokkan 14 og var opin líka til mánakvøldið klokkan 20. Tá høvdu tilsamans 946 fólk nýtt høvið at støkka inn á gólvið at síggja listaverk eftir bæði kend og minni kend listafólk.

Sum hini undanfarnu sjey árini, var talan um eina søluframsýning, og mong vóru tey, ið valdu sær eitt listaverk burtur úr rúgvuni, tí ikki færri enn 36 av teimum umleið 140 listaverkunum á framsýningini blivu seld.

**Sjónleikarhúsið fær ágóðan**

Nú verður so gjørt upp, hvussu nógv listaframsýningin á ólavsøku hevur kastað av sær. Tá neyðugu útreiðslurnar eru drignar frá, fer allur ágóðin av bæði atgongumerkjasølu og sølu av listaverkum til vælgerandi endamál.

Hesa ferð hevur Lions Club Tórshavn gjørt av, at ágóðin skal fara til Havnar Sjónleikarfelag, sum skal keypa kaféborð, -stólar, videokanón og lørifti til Sjónleikarhúsið í Havn, sum í dagtímunum verður nógv brúkt til skeið, fundir, ráðstevnur og annað.

**Ólavsøkugestur vann málning**

Somuleiðis var ein av gestunum so heppin at vinna ein málning eftir Hergerð Joensen í Havn. Tað var gesturin, ið fekk skránna við nummarinum 381. Lions Club Tórshavn sigur, at hepni gesturin hevur vitjað framsýningina millum klokkan 16 og 18 ólavsøkudag.

Enn hevur vinnarin ikki gjørt vart við seg, men situr onkur við røttu skránni, so fæst málningurin við at venda sær til Bent Jákup Hansen í Havn, sum hittist á fartelefon 216561. Enn hevur eingin gjørt vart við seg.

Lions Club Tórshavn vil nýta høvið til at takka øllum, sum hava vitjað framsýningina, sýnt síni listaverk fram, keypt listaverk og annars verið við til enn eina ferð at gjørt framsýningina til eitt gott tiltak.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.